# Føroyar – nýtt ferðamannaskip í 1953 og 2003

**Fyrstu ferð føroyingar fingu eitt nýtt ferðamannaskip til uttanlandasigling var í 1953. Næsta nýggja ferðamannskipið til uttanlandasigling kom júst 50 ár seinni.**




*Sáttmálin millum Skipafelagið Føroyar og Aalborg Værft varð undirskrivaður 30. mai 1950, og Tjaldur kom til Havnina fyrstu ferð 1. februar 1953.*




*Nýggja Norröna kom júst 50 ár aftan á Tjaldur. Tey eru einastu ferðamannaskip, sum eru nýbygd til føroysk reiðarí.*

FERÐAMANNASKIP

*Magnus Gunnarsson*

Føroyingar hava bert fingið tvey nýggj ferðamannaskip, sum eru bygd til eitt føroyskt reiðarí, til uttanlandasigling. Tjaldur hjá Skipafelagnum, ið bleiv bygt á Aalborg Værft, og kom fyrstu ferð á Havnina 1. februar 1953, og Norrönu, ið er bygd á Flender Werft í Lübeck og kom fyrstu ferð á Havnina 10. apríl 2003. Tjaldur var nýbygningur nr. 110 á Aalborg Værft. Sáttmálin millum Skipafelagið Føroyar og Aalborg Værft varð undirskrivaður 30. mai 1950. Kjølurin bleiv strektur 29. september 1951. Skipið bleiv sjósett 28. juni 1952 og latið eigarunum 21. januar 1953. Skipið var fyrstu ferð í Føroyum 1. februar 1953. Tjaldur kostaði millum 10 og 11 milliónir. Orsøkin til høga prísin var, at man ynskti eitt nútímans og vælbygt ferðamannaskip, sum skuldi lúka øll altjóða trygdarkrøv.

## Tjaldur kom 1. februar 1953

Í bók síni »Tjaldur – beretningen om den færøske handelsflådes navnkundige flagskib« skrivar Bjarni Åkesson Filholm um tá m/s Tjaldur kom av skipasmiðjuni í Aalborg til Keypmannahavnar. »Det nybyggede motorskib, Tjaldur, kom til København den 21. januar 1953. Der blev afholdt forskellige receptioner ombord for ministerier, venner og forretningsforbindelser, mens skibet var der. Desuden blev alle færinger bosiddende i København indbudt til at komme og besigtige det nye skib inden det skulle ud på sin jomfrurejse. Thorsdag den 29. januar stævnede »Tjaldur« ud fra Københavns havn på sin første tur mod Færøæerne med ca. 100 passagerer ombord. På denne rejse fik skibet sin ilddåb, for da man nåede op omkring Shetlandsøerne bød alle orkanens djævle op til dans på Nordatlanten. Uvejret kom som et lyn fra en klar vinterhimmel ved middagstid om lørdagen. På et tidspunkt var vindstyrken 11. Ved denne lejlighed blev der smadret nogle ruder og andre småting, men »Tjaldur« led ikke nogen alvorlige skader. Skibet viste sig at være usædvanligt sødygtigt og let at manøvrere for besetningen.

I mellemtiden havde de færøske aviser begejstret fortalt historien on dette nye skib. I dagene op til ankomsten var det som en regulær nedtælling med artikler indeholdende de seneste nyheder. Det giver en nutidig læser og betragter en tydelig fornemmelse af, havd dette skib betød for færingerne, når blot selve rygtet om dets komme i den grad kunne optage sindene.«

Um móttøkuna Tjaldur fekk, tá tað kom á Havnin 12 tímar seinkað, skrivar hann: »Det var mørkt og koldt, men der var masser af folk på kajen for at se skibet lægge til. Der blev holdt taler, der var korsang og hornmusik samt opfordringer til alle på Færøerne om at stå sammen om dette hidtil største skib under færøsk flag. Højtalere var blevet sat på alle omkringliggende bygninger ved kajen. Skibet var strålende illimineret, da det lagde til ved den tætpakkede kaj.«

*Kelda: Tjaldur*
*v/ Bjarni Åkesson Filholm*

## Tjaldur

| | |
|---|---|
| Longd | 88,6 m |
| Breidd | 13,6 m |
| Deyðvekt | 1.395 tons |
| Bruttotonnaga | 2.660,8 brt |
| Ferðafólk | 300 |
| Høvuðsmotorur | 4.400 hk |
| Prísur | 10-11 mill. Kr. |



*Roykisalong á 1. klassa umborð á Tjaldur.*



*Umborð á nýggju Norrönu.*

## Norröna

| | |
|---|---|
| Longd | 164,5 m |
| Breidd | 30,0 m |
| Deyðvekt | 4.300 t |
| Bruttotonnaga | 36.000 brt |
| Ferðafólk | 1.482 |
| Høvuðsmotorur | 30.000 hk |
| Prísur | uml. 700 mill kr |